# Ein bronsa og fleiri næstan



*Schandorff vann enn eitt heiðursmerki í bogaskjóting, tá hann vann bronsu í sonevndu head-to-head kappingini*






## Føroyska úrtøkan í bogaskjóting mikudagin var eitt bronsumerki til Schandorff

BOGASKJÓTING
*Jákup*

**Guernsey:** At treytirnar eru harðar í head-to-head kappingini, er einki at ivast í. Aðra staðni her í blaðnum er greitt frá, hvussu Rói Johannesen á seinasta ørvinum misti bronsuna, og í fleiri øðrum dystum var eisini nær við hjá føroyingum, sum tá máttu takka fyri seg.

Í summum førum var tað nærum ómenniskjansliga tætt. Rógvi Mohr mátti til dømis síggja mótstøðumannin skjóta eitt stig fleiri, og enntá finna út av eftirfylgjandi, at tann pílurin ikki var í lagi. Hetta var í dysti móti gullvinnaranum frá týsdegnum, so tað var ikki løgið, at Rógvi iðraði se um hetta. Í Recurve hjá hjá kvinnum fór fyrst Annlott Rasmussen út, eftir at hon annars hevði skotið framúr væl, men trupulleikin var bara, at mótstøðukvinnan skeyt betri.

Tað sama var galdandi hjá Anniku Vang. Hon rendi seg í 1/4 finaluni í einari av absoluttu oddakandidatunum. Annika skeyt væl, og hevði mótstøðan bara verið onkur onnur, so hevði hon vunnið, men hon misti sostatt møguleikan fyri heiðursmerkjum, sum annars vildu sett eitt flott punktum fyri hennara viðkomandi..

### Bronsan kom í hús

Av compund skjúttunum mundi Sigrid Vang vera tann, sum fekk harðastu lagnuna. Hon skuldi í 1/4 finaluni royna seg móti skjúttanum, sum fekk silvur týsdagin. Her stóð á jøvnum eftir 12pílar, og so var bara eitt at gera. Skjóta ein einasta ørv eftir skivuni, og so varð aftur lagt saman. Her rakti Sigrid ein fimmara, meðan mótstøðukvinnan rakti mkit í, og so var eisini tað avgjørt. Alberta Gaardlykke rendi seg her í satt ódnarverður, tá hon í fyrsta dystinum rendi seg í sterku Caroline Pinchemain.

Og við víðvíkjandi heiðursmerkjum í compund, so stóð skjótt greitt, at skuldu hesi koma, so mátti tað helst verða frá Schandorff. Per Holm Andersen reyk út við smáum marginalum móti Ian Lee Page, og Anders Jønsson og Jóannes Poulsen hittust longu, tá skotið var millum teir seinastu 16. Ein dysur, sum Jóannes vann, men tá hann so møtti Richmond Robinson í 1/4 finaluni, so var liðugt. Sami Richmond gjørdi tað av við Schandorff, og so var bronsan eftir at stríðast um. Her slepp Schandorff at hevna seg á Heath Perret, sum annars vann compound-kappingina í ár.

Hósdagin skuldu bogaskjúttararnir enn einaferð kappast í head-to-head, tá liðkappingin í hesum fer av barkastokki. Her áttu Føroyar at staðið við einum reellum møguleiki fyri heiðursmerkum, og so er spurningurin helst bara, hvørt marginalarnir hesa ferð vera við ella ímóti.



# MENTANARNÁTTIN2003

## Í miðbýnum fríggjakvøldið 4. juli

**Vaglið** • kl. 18: Mentanarnáttin verður sett. Havnar Hornorkestur spælir og Oddvá Nattestad setur kvøldið

**Boysensgarð** • kl. 21-21.30: Gospel Trio syngur
Garðurin er opin til kl. 23

**Café Natúr** • Kl. 22-1.30: Matz Lidegaard spælur

**Dr. Jakobsens gøta v. FK** • Kl. 15-16: Paradox og Toxic spæla

**Gongugøtan** • Kl. 14.00: Fólkadansur við Leikaringen Huldra úr Røyken, Noreg

**Gongugøtan** • Kl. 16-17: Pele Møller Band spælir

**Gongugøtan** • Kl. 19.00: Angela og Hannibal undirhalda í gongugøtuni.

**Havnar Kirkja** • Kl. 18-21: Kirkjan er opin

**Havnar Klubbi** • Kl. 17.30-18.30: Irving Anckers Sekstet spælir

**Havnar Klubbi** • Kl. 23-03: Trio de Janeiro, Maria Guttesen Band og Headache Blues Treo. kr. 100,00

**KFUM** • Kl. 20-04: Tensingkórið syngur og hevur kafé kvøld. Opið er kl. 20-04

**Landsbókasavnið** • - kl. 22: Vítt um Verøld. Ferðaminni og ferðafrásagnir. Summarframsýningin 2003, opið er til kl. 22.

**Listaskálin** • - kl. 21: Rundvísing kl. 18.30 (tilmelding).
Konsert við Tom Nagel Rasmussen Band. 80 kr.

**Meiarlíð** • Kl. 21.30-23: Paradox, Toxic og Monkey Mongolia hava konsert á Meiarínum í Tórsgøtu. kr. 60,00.

**Móttøkuhúsið** • Kl. 18-23: Høvi verður at síggja málningasavnið í Tórshavnar Móttøkuhús og Myndasavn, Tróndargøta 42

**Náttúrugripasavnið** • Kl. 11- 22: Náttúrugripasavnið er opið

**Náttúrugripasavnið** • Kl. 15-20: Plantufrøðiligi urtagarðurin: Fólk eru í urtagarðinum frá kl. 15-20. Smáar føroyskar plantur til sølu, avmarkað nøgd.

**Odd Fellow** • Kl. 19-23: Odd Fellow Ordanin í Tórshavn letur hurðarnar upp. Mentanarnáttin 2003 bjóðar losja nr. 1 Ambólturin, IOOF øllum áhugaum at vitja losjuna á Grønlandsvegi nr. 56. Øll eru hjartaliga vælkomin, at seta spurningar losjuni viðvíkjandi, og eftir førimuni fáa hesar svaraðar.

**Smiðjan í Lítluvík** • Kl. 16-23: Sofus Poulsen letur upp listaframsýning kl. 16. Kl. 16 og 21 spæla Brandur Olsen guitar og Jona Jacobsen violin

**SMS Pallurin** • Kl. 18: Angela og Hannibal underhalda

**SMS Pallurin** • Kl. 20-20.30: Gospel Trio syngur

**SMS Pallurin** • Kl. 14: Ølholm Folkedansere úr Danmark

**SMS Pallurin** • Kl. 16: Næmingar úr Tórshavnar Musikskúla spæla léttan tónleik

**SMS Pallurin** • Kl. 23: All That Rain spæla á pallinum

**Snarskivan** • Kl. 18-23: Málningaframsýning hjá Kára Svensson og Áslu Rannvá Svensson

**Tinganes-Reyni** • Kl. 19 og 21: Gongutúrur við ferðaleiðara í gamla býarpartin kl. 19 og kl. 21. kr. 40,00.

**Vaglið** • Konsert við Trio de Janeiro kl. 22.30

**Vágsbotnur** • Kl. 14: Føroyskur dansur v. Vága Dansifelag

**Vertshúsið** • Kl. 22: Syngið við - Jógvan Dahl spælir gamlar kabaretsangir.

